# »Leys av brotasjógvum«

*Nornan hon spinnur vár lagnutráð*
*bæði við liðum og høllum á,*
*fáu fær tráðin heilt slættan*
*ein táttur er silvur,*
*ein annar er gull,*
*tann triði ein tárakelda so full*
*tó spinnur hon tráðin rættan*
*tí hann ið gav okkum lív og ond*
*heldur í spunalag heldur um hond,*
*so hansara leið vit finna.*



Tað kann av sonnum sigast, at tann síðsti teinurin á lívsleið hennara var sum tann triði tráðurin í ørindinum, ein tárakelda so full.

Men soleiðis kann lagnan falla so ymisk frá fólki til fólk. Men fáur sleppur tó heilt óskalaður í lívsins leiki. Tað er, sum maðurin segði: Eingin sleppur livandi frá lívinum.

Eg kom at kenna Hannu, tá ein av brøðrum mínum giftist við dóttur hennara, tað eru mong ár síðan nú.

Eg havi mangan sitið væl inni hjá henni.

Tað er soleiðis, at nú havi eg verið sjómaður. Plagdi tí at egna hana við onkrum úr sjónum, tá tað lá fyri, og tað var hon sera fegin um.

Tá eg soleiðis kom á gátt, var hon skjót við kannuni, og gávur at siga frá hevði hon góðar, so tað var hugnaligt at sita við tekoppinum í hondini og hoyra hana greiða frá.

Tá ein so fór av aftur gáttini, so hevði ein altíð einar ullintar hosur í hondini. Sum hon altíð segði: »Ein tænasta er aðra verd«, og so legði hon afturat: »Ein sjómaður má vera heitur um beinini.«

Seinastu ferð eg var á hennara gátt, tá gekk tosið ikki so lættliga, sum tað hevði gingið áður, tí tá hevði lagnan víst seg frá síni beisku síðu.

Tá eg segði henni farvæl, segði hon, at nú orkaði hon ikki at taka fleiri bakkøst, men alt stendur tó í Guds hond.

Tað gekk ikki meir enn ein góð vika, so kom tað størsta grunnbrotið, og hetta varð so hennara bani. Hon kom ongantíð fyri seg aftur.

Tað er við takksemi til hennara, sum nú hvílur undir moldum, at eg skrivi hesar fáu reglur.

Væl verma allar hosurnar, eg fekk frá henni.

Nú er hon komin í lívd av øllum brotasjógvum og hevur lagt at á tí himmalsku støðni. Tann stóri støðleiðarin hevur tikið um hond hennara og leitt hana inn í aldingarðin, har glaðir fuglar láta.

Má Harin styrkja tykkum, sum eftir sita.

Friður veri við minninum um Hannu í Selvindi.

**Jóhan Karl**

## Andlát og jarðarferðir

**Niels Joensen, ættaður úr Skopun**, búsitandi í Tórshavn, andaðist á Lágargarði mánadagin 10. desember 83 ára gamal. Jarðarferðin verður lýst seinni.

**Jens Torólv Nolsøe á Tvøroyri**, andaðist sunnudagin á Suðuroyar sjúkrahúsi, 72 ára gamal. Jarðarferðin verður lýst seinni.

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at

**Bjarma Niclasen**
Velbastað

doyði heima sunnudagin 9. desember.
Jarðarferðin verður úr Kirkjubøar kirkju hósdagin kl. 13.

*Familjunnar vegna,*
**Dánjal og døturnar**

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, ið mintust til okkum á gullbrúdleypsdegnum 30. november.
Somuleiðis eini hugnalig jól.

**Kári og Ásbjørg Thomassen, Tvøroyri**

# Nýggj kort og jólakort



**Listakvinnan Edith Mørkøre í Hoyvík hevur saman við Bjørg Mohr Andersen og Jákupi Zachariassen sniðgivið og givið út føroyskt framleidd kort og jólakort, sum í hesum døgum eru at fáa kring landið**

### JÓLAKORT

Í hesum døgum eru nýggj og spennandi kort at síggja í detailhandlum kring landið. Tað er listakvinnan Edith Mørkøre í Hoyvík, sum hevur tikið stigið og sniðgivið hesi kort við hjálp frá Bjørg Mohr Andersen og Jákupi Zachariassen. Myndevnini hevur hon tilevnað úr saltdeiggi, brent og málað.

Kortini hava eina einfalda og skemtingarsama útsjónd, sum ger at tey við sínum kláru og persónligu útsjónd koma at gleða móttakaran.

Edith Mørkøre sigur, at nógv ymsik kort eru at fáa í handlunum kring landið í dag. Flestu teirra eru náttúrumyndakort sum eru føroysk. Vit síggja eisini nógv kort við føroyskum teksti, sum eru beinleiðis umsett úr donskum, enskum o.s.v.

Hendan føroyskt framleidda kortrøð hevur 16 ymiskum myndaevni, 4 jóla og 12 onnur í samband við merkisdagar og líknandi. Kortini eru 14x14cm til støddar, pakkaði saman við konvolutti í snøggun foliupakka. Vegleiðandi prísur er 29,95 fyri kortið.

Kortini eru at fáa í nógvum ymiskum handlum kring landið, bæði bókahandlum og øðrum handlum.



**Dagurin**
**13. desember. Lucia**, deyð umleið ár 300. Ung genta úr Syracus í Sikiloy. Hon var trúlovað heidnum ungum manni, men narraði hann, varð klagað fyri kristnu trúgv sína og tikin av døgum. Siðurin við luciugongum við gentum við tendraður ljósi í hárinum er komin úr Svøríki. Navnið Lucia kemur av latínska orðinum lux, sum merkir ljós